Hoyring um broyting í fólkaskúlanum.

Skúlaleiðarafelagið tekur undir við uppskotinum, men vit hava hesar viðmerkingar.

Tað er sera umráðandi, at tað er púra greitt, at 21. Næmingurin útloysir játtan til nýggjan flokk.
Eisini halda vit, at standa skal sum nú, "skúlaleiðslan kann koyra flokkin í 2 ella gera aðra fyriskipan t.d. tvílæraraskipan".
Viktugt at halda fast við, at tað er leiðslan sum tekur avgerðina um at koyra sundur ella gera aðra skipan frá 1. – 9. flokk.

Í viðgerðini av hesum uppskotinum, komu vit til, at hetta er gott fyri 3. – 9. flokk.
Hetta gevur møguleika til, at hjálparlærari kann setast inn, tá ið flokkurin verður 21 næmingar. Hetta er ikki møguligt í dag.

Verri er fyri 1. og 2. flokk, tí so sum vit skilja uppskotið, so fellur núverandi skipan við tvílærara burtur

Um nýggja skipanin verður sett í verk, so halda vit, at tað er viktugt at halda fast í tvílæraraskipanini í 1. og 2. flokki. (Sí viðfesti)

Um støddin á flokkinum verður sett til 20 næmingar, so má marki fyri, nær vit fáa tvílærara til 1. og 2. flokki setast niður at byrja við 13. næminginum.
So kunnu tvílæraratímarnir vaksa so líðandi til vit raka 21, og tá kemur játtan til heilan flokk inn í skúlan.
Orsøkin til hetta er, at tað er vorðið alsamt strævnari at verða flokslærari í grunddeildini. Í summum skúlum er tað trupult at fáa fólk at taka 1. flokk, tí hetta er nú tyngsta økið í skúlanum. Fakligu krøvini eru nógv hækkaði seinastu árini, tað skulu gerast 5 lesikanningar fyrsta skúlaárið, rokniroyndir, tætt og rúgvusmikið foreldrasamstarv og skrásetingararbeiði.
Harafturat skal munandi størri orka leggjast í tann sosiala og dannandi partin.

Hægsta mark
Flokkurin kann koyrast sundur ella halda fram saman, men eitt hægsta mark má vera, so at vit ikki kunnu hava fleiri enn 24 næmingar í einum flokki. Við 25. næmingin skal flokkurin koyrast í 2. Hetta er fyri, at vit ikki fáa flokkar við 25 + næmingum í.

Gátt
Vit eftirlýsa eina gátt. Nær kann man hava ein skúla/flokk?
1 næmingur til heilan skúla er ikki ok. Isolatión av børnum er als ikki gott. Sernám vísir til, at tað kann verða ein vansi at hava ov fá børn í einum flokki.
Har tað er koyrandi millum bygdir, mugu vit tora at flyta næmingin, so hann kann verða saman við øðrum børnum.
Vit vita tó, at á útoyggj ber illa til at gera annað, tó kundu vit havt næmingar við á teams.

Vegna Skúlaleiðarafelagið
Jóhan M. Stenberg (Formaður)